## Backe hjálparvenjari í City

Svenski Hans Backe, sum í fleiri ár var venjari hjá Toda Jónsson í FC Keypmannahavn, er nýggjur hjálparvenjari í Manchester City. 55 ára gamli Backe hevði annars tikið seg meira ella minni aftur frá venjarayrkinum, men tá ið boð vóru eftir honum úr Onglandi, kundi hann ikki siga nei. Backe verður sostatt hjálparvenjari hjá landsmanninum Sven-Gøran Eriksson. Backe vónar, at hann kann geva City-liðnum struktur og organisatión.



## Súni víðari í Intertoto

Eftir javnleik 2-2 á útivølli ímóti finska liðnum FC Honka, kundi AaB avgera alt á heimavølli. Og tað gjørdu teir, hóast tað ikki var so sannførandi, sum tað kundi verið. Dysturin á Aalborg Stadion endaði við javnleiki 1-1, og so kom AaB víðari, tí liðið hevði gjørt fleiri mál á útivølli. Jón Rói Jacobsen spældi í verjuni frá dystarbyrjan, og hann var tikin út fimm minuttir fyri tíð. Súni Olsen spældi allan dystin á miðvøllinum. AaB skal í næsta umfari av Intertoto Cup spæla ímóti belgiska liðnum Gent.

# Havfrúgvin á meistarakós



*Sílið hevur mangan givið harða kapping, men hesa ferð tóktist Havfrúgvin tó seta punktum fyri FM-spenninginum. Enn er tó ólavsøkan eftir at kappast um*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Dysturin í millum Havfrúnna og Sílið hjá 5-mannaførum við dreingjum hevur verið harður í ár, men við sigri á vestanstevnu hava dreingirnir umborð á Havfrúnni bara brúk fyri tveimum stigum afturat fyri at tryggja sær meistaraheitið**

KAPPRÓÐUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hjá seks av bátaflokkunum kundu fremstu bátarnir í FM-kappingini við einum sigri á vestanstevnu sjálvir avgera, um teir fóru at vinna meistaraheitið. Einasti bátaflokkurin, har fremsti báturin ikki sjálvur kundi avgera meistaraheitið á vestanstevnu, var hjá 5-mannaførum við dreingjum. Her var Havfrúgvin fýra stig framman fyri Sílið undan róðrinum í Sørvágu, men eftir róðurin er alt, sum bendir á, at Havfrúgvin fer avstað við meistaraheitinum.

Dreingirnir umborð á Havfrúnni vunnu nevniliga ein knúsandi sigur á vestanstevnu, har teir vóru meir enn hálva aðru bátslongd framman fyri Sílið. Við sigrinum eru teir nú seks stig framman fyri Sílið, og tí skulu teir bert hava tvey stig á ólavsøku fyri at tryggja sær meistaraheitið.

### Ólavsøkan hevur stóran týdning

Gleðin var sum vera man sera stór umborð á Havfrúnni eftir sigurin, sum sigst vera fyrsti sigur hjá einum báti úr Vestmanna á Sørvágsfirði nakrantíð.

- Hetta var sjálvandi øgiliga gott. Vit fingu eina lítla leiðslu beinanvegin, men inn eftir fjørðinum svaraði Sílið aftur. Vit høvdu tó ein góðan miðróður í dag, har vit øktu um munin, og í endanum fóru vit so ordiliga frá Sílinum, sigur ein av dreingjunum umborð á Havfrúnni, Frank Müller.

Hann er eisini avgjørdur á málinum, tá vit spyrja hann um síðsta róðurin, sum verður á ólavsøku.

- Meistaraheitið skal so í øllum førum vinnast. Tað er einki at ivast í tí. Tað hevur tó eisini sera nógv at siga fyri okkum at vinna ólavsøkuróðurin, tí hesin hevur ótrúliga stóran týdning, sigur Frank at enda.

# Enn eitt meistarahei



**Jarnbardur hevur meir ella minni átt 6-mannaførini hjá kvinnum síðstu nógvu árini, og á vestanstevnu leygardagin kundu tær leggja enn eitt meistaraheitið afturat samlingini**

KAPPRÓÐUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eingin ivi er um, at manningin á Jarnbardi hjá 6-mannaførum við kvinnum ætlaði sær at vinna róðurin á vestanstevnu, og sostatt fáa sætta sigurin á rað í ár. Men fyri at tryggja sær meistaraheitið á vestanstevnu, so var í roynd og veru ikki neyðugt hjá teimum at vinna róðurin. Tær skuldu nevniliga bara fullfíggja róðurin, tí munurin niður til Kollfirðing á øðrum plássi var so stórur undan vestanstevnuróðrinum, at Kollfirðingur hevði ongan møguleika at fanga Jarnbard aftur, um hesin megnaði at koma á málið.

Og ikki so óvæntað, so kláraðu kvinnurnar umborð á Jarnbardi at finna mállinjuna á vestanstevnu, og tað gjørdu tær sum ikki einaferð í stórum stíli. Tær førdu nevniliga frá fyrsta taki, og inn eftir fjørðinum gjørdist munurin bara størri og størri niður til hinar báðar bátarnar, Kollfirðing og Lóm. Á málinum vóru tær langt fremst, og so var enn eitt meistaraheiti veruleiki.

Eftir róðurin fingu vit orðið á tríggjar av fegnu vinnarunum umborð á Jarnbardi.

### Altíð deiligt at vinna

Jarnbardur hevur ikki fingið tað øgiliga kappingina hjá 6-mannaførum við kvinnum í ár, men allíkavæl vóru tær tríggjar sera fegnar um sigurin.

- Ja, tað er altíð deiligt at vinna. Man er við fyri at vinna, og tí er gleðin sjálvandi eisini stór, tá hetta eydnast, siga tær.

Sjálvt um tær vunnu ein tryggan sigur á vestanstevnu leygardagin ,so vóru tær allar samdar um, at tað var ógvuliga tungt at rógva henda dagin.

- Ja, tað føldist øgiliga tungt at rógva í dag. Tað var næstan sum at rógva í siroppi. Annars var gongdin á leið tann sama sum á hinum stevnunum. Vit løgdu hart út, og so royndu vit bara at halda ella økja um leiðsluna inn eftir firðinum, og hetta eydnaðsit til fulnar.

Fýra bátar hava verið við til eina stevnu í ár hjá 6-mannaførum við kvinnum, meðan talið annars hevur verið tveir ella tríggir bátar, og hetta er sjálvandi ikki serliga nógv. Sjálvt um tær tríggjar vóru ógvuliga glaðar um sigrarnar í ár, so vóru tær tó samdar um, at kappingarárið í ár hevur ikki verið júst tað sama, sum okkurt annað árið.

- Nei, tað hevur ikki verið heilt tað sama í ár, tí tað hava verið so fáir bátar við í kappingini hjá okkum. At rógva ímóti tveimum bátum er ikki líka stuttligt, sum tá til dømis átta bátar eru við, soleiðis er tað bara. Vit eru tó glaðar um, at fyrst og fremst Kollfirðingur valdi